VALGREINAR

# Almenni sektorurin

**Annfinn Brekkstein**
*Valevni hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymoy*



Almenni sektorurin í Føroyum er í mun til fólkatal og samlaða bruttotjóðarframleiðslu ein tann størsti í heiminum.

Sæð út frá einum skynsomum rakstrarligum sjónarmiði, er tað ikki fíggjarligt rásarúm fyri framhaldandi øking av almenna partinum av føroyska búskapinum.

Heldur tvørturímóti eigur at vera miðað ímóti, at effektivisera og rationalisera almenna sektorin við nýggjum hugskotum og alternativum loysnum.

Vit eiga ikki at lata almenna partin av føroyska búskapinum stirðna í trongskygni og vanahugsan.

Møguleikarnir við at privatisera ávísar uppgávur og útlicitera aðrar, eiga støðugt at verða tiknir fram sum alternativ til núverandi skipan.

Royndir aðrastaðir frá, eiga at verða tiknar við sum fyrimyndir tá farið verður til verka.

Málið má vera, at ein dygdargóð tænasta fæst fyri ein lutfalsliga bíligan pening, sum á einhvønn hátt er kappingarfør við almennu tænasturnar.

# Javnaðarflokkurin hamskiftur eftir seinastu veljarakanning

**Edmund Joensen**



Sambært seinastu veljarakanning gjørdist Sambandsflokkurin størsti flokkur. Javnaðarflokkurin gjørdist nr. 3

Eftir hesa kanning er Javanðarflokkurin hamskiftur. Tað er mangt sum bendur á at leiðslan er farin beinleiðis á strategifund við tí dagskrá og hevur avgjørt, at fremstu javnaðarfólk uppá skift skulu leggja eftir Sambandsflokkinum.

**Eyðálvur Dimon**
Fyrst í røðini í planløgdu herferðini var Eyðjálvur Dimon. Hann kom við eini beinleiðis ósannheit um Sambandsflokkin. Eyðálvur førdi fram, at Sambandsflokkurin hevði atkvøtt fyri at lækka blokkstuðulin. Veruleikin er, at Sambandsflokkurin við øllum sínum atkvøðunum atkvøddi nei fyri at lækka blokkstuðulin, bæði fyri uppskotinum hjá landsstýrinum og eisini atkvøddi flokkurin nei fyri lækkingini hjá Javnaðarflokkinum.

**Vilhelm Jóhannesen**
Næstur í røðini var tingmaðurin Vilhelm Jóhannesen, sum eisini segði ósatt, við eini grein, hann kallar Sambandsflokkurin setti gongd á fullveldið.

Øll sum minnast bara eitt litið sindur vita, at javnaðarflokkurin 1996 sleit samgonguna og fór garterandi niðan í løgtingi við einum uppskoti, sum ikki bara setti ferð á fullveldið, men Javnaðarflokkurin setti seg sjálvan út í myrkrið og har situr hann enn. Javnaðarflokkurin beinleiðis lovaði loysingarflokkunum framat og hevur beinleiðis høvusábyrgdina av tí, sum hent er síðani, eisini fyri Suðuroy.

**Tummas Arabo**
Honum í hølunum kemur Tummas Arabo við sínari ósannheit ímóti Sambandsflokkinum.

Hann skrivar eina grein, sum hann kallar Sambandsflokkurin og ES. I greinini reingir Tummas veruleikan við vilja.

Sannleikin og veruleikin er, at Sambandsflokkurin hevur sett uppskot fram um at taka upp samráðingar við ES felagskapin fyri á henda hátt at finna út av treytunum fyri møguligum limaskapi, onki annað. Hetta hava allir politiskir flokkar fyri neyðini at vita, eisini Javnaðarflokkurin, um naka skil skal verað í nakrari støðutakan.

**Jóannes Eidesgaard**
Jóannes himself kemur so sum tann fjórði í røðini, við eini ramsu heilt aftur til 1970. Statsmaðurin hevur leita við ljós og lykt, bæði millum livandi og deyðar tingmenn úr Sambandsflokkinum. Statsmaðurin heldur seg hava funni onkur prógv fyri at Sambandsflokkurin ikki vil Suðuroy nakað gott.

Álvara tos Jóannes, skulu vit sum flokkar nú í herna ímóti hvørjum øðrum, so trýtur ikki tilfar at taka av. Javnaðarflokkurin var jú felagsnevnarin fyri teimum ólukkum, sum førdu til føroyska húsagangin. Javnaðarflokkurin var stjórnarflokkur allar flestu av hesum árum, væl stuðlaður av loysingarflokkunum.

Hjá formanninum er eisini vert at minnast seinasta bragdið í samgongu. Var hann ein veruligur statsmaður, so hevði hann ikki slitið samgonguna í 1996 og latið Fólkaflokk inum og øðrum fullveldismonnum frítt spæl í landsstýrinum síðani.

**Dømini tróta ikki**
Vit finna saktans ríkiligt av dømum, til at fylla bløðini hetta fram til valið, um so skal verða. Tað sum er mest harmuligt er, at meðan Javnaðarflokkurin er upptikin av at niðurgerða Sambandsflokkin, kunnu so Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin í friði og náðum fara spælandi um málið á valinum, og kunnu so halda fram við sínum oyðileggjandi politikki 4 ár aftrat.

Hvat fer Jóannas tá at fortelja suðuroyingum? Hvør far tá skylduna? Tá er ikki vist at suðuroyingar ella aðrir føroyingar eru nøgdir, og fara at gótaka undanførslurnar.

Eitt er vist: Hendan av Javnaðarflokkinum ísenusetta niðugeringin av Sambandsflokkinum førir ikki ávegis fram til eina samgongu, sum bjargar ríkisfelagskapin og vælferðarsamfelagnum.

Men tað er kansa tað, sum er tann veruliga ætlanin, tá íð saman um kemur. Livst so spyrst!

# Valið 2002 - stutt og greitt 6: Mentan og list

**Hans Jacob Hermansen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Vit eru føroyingar, serstøk tjóð, hoyra vit ofta, men hví? Kanska kennir eingin rætta svarið, men vit halda, at okkara mentan er hjartað í tí, sum farið er fram, síðan fólk settu fótin á land á fyrsta sinni. Hon er úrslitið av strevi og stríði fyri at liva, arrið eftir sorg og smílið eftir gleði í meiri enn 1000 ár.

Mentan er tjóðarinnar hjartasláttur, og listin er hennara mál. Mentan og list eru samfelagsins samvitska. Tann tjóð er lívssør, sum eigur onga mentan. Tað fólk er fátækt, sum hevur ikki ráð at lata listina liva.

Listafólkini skapa, og fjøldin styrkir seg við løgi teirra úr brunni, ið vónandi ongantíð tømist. Men so mugu vit geva okkara listafólkum virðilig lívskor, hóast tey eru ikki altíð so eyðmjúk, sum onkur kundi ynskt.

Sjálvstýrisflokkurin hevur mangan havt ábyrgdina av okkara mentanarpolitikki, og honum tekur flokkurin fegin ábyrgdina av eitt skeið afturat.

Setið ein sterkan Sjálvstýrisflokk inn á Føroya Løgting, tí svíkur miðjan, nytta endarnir einki!

# Nú vantar Tjóðveldisflokkinum pengar og tí noyðist Høgni Hoydal at boða frá, at pengar eru ikki alt

**Atli Hansen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Man kann ikki annað enn fáa samkenslu við teimum fjølmiðlafólkum, sum í hesum tíðum skulu royna at fáa samanhang í tí orðaflóð, sum kemur frá Høgna Hoydal. Ein ótrúlig rúgva av orðum uttan slit og sum eru torfør at seta saman til nakað skilagott. Men nú eru fýra orð farin at skilja seg burtur úr og hesi kunnu setast saman til ein setning, nevniliga: Pengar eru ikki alt.

Jú, Høgni Hoydal. Tá íð vit tosa um búskap, tá eru pengar ein ógvuliga týðandi partur. Og nú tit heldur ikki fáa endarnar at røkka saman, tí at pengarnir fara at vera ein mangulvøra, so skal gloppið fyllast út við onkrum øðrum, sum ikki er pengar. Hvat íð tað so er! Uttanumtos og einki annað.

Tað verður torført hjá einhvørjari samgongu at koma eftir tykkum. Tit hava økt rakstrarútreiðslurnar í hesum valskeiðinum við uml. 1 milliard krónum. Tit hava gjara so nógv út til valið, at tit handa eftirkomarunum eina fíggjarlóg við halli. Tit handa okkum rokningar fyri vantandi blokk og skilaleysar yvirtøkur. Og so eru pengar ikki alt? Jú, tá íð teir mangla, kunnu teir hava alt at siga.

Í 1998 handaðu vit tykkum eina fíggjarlóg við 470 mió. kr. í avlopi og ein búskap í besta blóma aftaná størstu búskaparkreppu í Føroya søgu og eitt samfelag, sum var klárt til at fara undir endurreisingina eftir kreppuna. Tað er ringt at fáa eyga á, hvat íð tit hava brúkt allar pengarnar til. Eingin endurreising. Ikki eitt røktarpláss er komið afturat, hóast tit royna at billa fólki inn, at ein bygningur er komin í Streymnesi. Mær vitandi er ikki spaki settur í jørðina enn.

Føroyar eru framvegis eitt gott og ríkt land at búgva í, men her skal umsitast ørvísi og leggjast ørvísi og longri ætlanir enn henda fullveldisfikseraða samgongan hevur klárað.

Tað hevur verið lutur Sambandsfloksins at taka upp. Soleiðis var í 1994. Eingin annar kundi og soleiðis verður eisini nú. Sambandsflokkurin vil sleppa framat aftur at fáa ávirkan á gongdina í samfelagnum og biðjur um fólksins undirtøku til hetta.

Ein atkvøða fyri Sambandsflokkinum er eitt stórt JA til eina raðfesting, har røktarpláss, heilsuverk, pensiónistar, vinna, familja, ungdómur og umhvørvi standa ovarlaga.

Og karmarnir skulu sjálvandi vera ríkisfelagsskapurin.



VALGREINAR

# Framá Føroyar við Sambandsflokkinum á odda

**Jákup Lamhauge**
*valevni sambandsflokksins í Eysturoy*



Valstríðið, sum nú fer at líða móti endanum, hevur verið nógv merkt av spurninginum um ríkisrættarligu viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark - Tjóveldisflokkinum so líkt, so koyrir hann fram við somu plátuni, sum teir hava spælt seinastu 50 árini - nevniliga kvøðuna um, at alt sum hevur við Ríkisfelagsskapin at gera er av tí ónda fyri føroyingar, og tí biða teir allar føroyingar um hjálp at slíta øll bond við Danmark.

Hinir samgonguflokkarnir - Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin við góðum stuðli frá Miðflokkinum - sum seinastu fýra árini hava hjálpt Tjóðveldisflokkinum við ørvitisætlanum teirra - tykjast í løtuni at vera ræddir fyri dóminum sum sagdur verður 30 apríl - og royna tí nú at eftirlíkna Sambandsflokkinum . M.a føra teir fram, at nú skulu vit steðga á, tí vit eru ikki fyrireikaðir at taka fleiri stig á sjálvstýrisleið fyribils.

Føroyingar eiga ikki at lata seg villeiða av stuðulflokkum Tjóveldismanna - søgan talar fyri seg - tá val hevur verið eru øll vallyftir gloymd og fullveldiskósin og loysingarstríðið heldur fram.

Sambandsflokkurin er alternativið til loysingarflokkarnar:

Sambandsflokkurin er einasti flokkur í Føroyum sum tillagar sín politikk eftir teim broytingum sum henda í samfelagnum her heima eins og umstøðunum uttan um okkum - ja flokkurin leggur sera stóran dent á at vit ikki gerast eftirbátar í mun til tey lond sum vit kunnu sammeta okkum við - tað verið seg á eldraøkinum, skúlaøkinum, á heilsuøkinum á pensiónsøkinum og annars á almannaøkinum sum heild.

Í spurninginum um ríkisrættarligu viðurskiftunum hevur Sambandsflokkurin lagt fram eitt nýskipanaruppskot, sum flokkurin bjóðar til samráðingar um við teir flokkar sum framhaldandi ynskja at varðveita ríkisfelagsskapin - eisini aftaná løgtingsvalið.

Sambandsflokkurin førir m.a.fram í nýskipanaruppskoti sínum:

1. Vit vilja endurnýggja heimastýrisskipanina
2. Vit vilja greiða ríkisrættarligu viðurskiftini,har tey eru ógreið
3. Vit vilja hava staðfest, at føroyar eru ein sjálvstýrandi tjó í ríkinum.
4. Vit vilja varðveita ríkisfelagsskapin og hava felags grundlóg og kongshús.
5. Vit vilja fylgja Danmark í Gjaldoyraviðuskiiftum.
6. Vit góðtaka, at verju-og uttanríkispolitikkur formliga verður umsitin av ríkismynduleikunum.
7. Vit vilja í høvuðsheitum varðveita verandi rættarskipan.

Sambandsflokkurin fer eftir valið at leggja alla orku í at varðveita Føroyar sum eitt væferðarsamfelag, og tí fer hann staðiliga at biða føroya fólk standa manniliga saman um flokkin týsdagin 30.apríl.

Slagorðið er tí: Framá Føroyar við Sambandsflokkinum á odda.

X við Lista B.

# Lívskor:
# Sambandið og Tjóðveldið í sama leypi

**Bergur P. Dam**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



**Framvegis er tað bara Javnaðarflokkurin, sum setir fóksins lívskor ovast á dagsskránna**

Tá Javnaðarflokkurin í september í fjør kunngjørdi valskrá sína - Fólkið fyrst - til hetta løgtingsvalið, vakti hon av røttum ans. Her vóru tey mál, sum seinastu 4 árini hava verið skúgvað til viks fyri eina ófyrireikaða loysingarætlan, tikin fram. Ein ítøkilig ætlan um, hvussu mest átrokandi gerandismálini kundu loysast, var júst tað, sum so ógvuliga nógv fólk vildu hava.

Formaður Tjóðveldisfloksins bleiv mest sum groggy og kunngjørdi, at um hesi mál skuldu loysast, ja, so fór landið á húsagang. Hann málaði allar ræðumyndirnar á veggin, um ólukkurnar, sum fóru at henda, nú Javnaðarflokkurin vildi byggja røktarheimspláss, loysa eftirlønarspurningin, fremja døgnrøkt, beina fyri bíðulistunum til sjúkrahusini, gera íbúðir til fólk við breki o.s.fr.

**Sambandsforskrekkilsi**
Heldur ikki Sambandsflokkurin var fegin um, at fólksins kor so ítøkiliga vórðu sett ovast á skrá. Sambandsfólk ákærdu - í djúpasta samljóði við tjóðveldisfólk - Javnaðarflokkin fyri at leggja okursbyrðar á kommunurnar. Hóast Javnaðarflokkurin greitt boðaði frá, at samráðingar um kompensatión skuldu verða við kommunurnar, so hóvaði valskrá okkara als ikki teimum.

**Uttanumtos**
Men tað var skjótt greitt, at Javnaðarflokkurin hevði rakt seymin á høvdið við síni valskrá. Hon fekk undirtøku í fólkinum.

Og hinir flokkarnir noyddist at ásanna, at teir á hesum vali ikki sluppu at snúgva sær undan at taka hesi mál upp í valstríðnum.

Við ringum tanabiti komu teir tí kropp av kroppi og søgdu seg eisini vilja gera nakað við hesi øki.

Men hóast tráspurdir, vilja teir ikki siga nakað ítøkiligt um, hvussu teir meina orðini. Teir vilja ikki seta tøl á, hvussu nógv røktarheimspláss skulu gerast, hvussu nógv búpláss fyri fólk við breki skulu gerast, hvussu nógvir bústaðir til fólk í útbugving skulu gerast.

Og hinir flokkarnir nokta blankt at siga, hvussu nógv teirra ætlanir á vælferðarøkinum fara at kosta landskassanum.

Teir royna at tosa uttanum, og royna síðan at seta upp kostnaðarætlan Javnaðarfloksins á ymsar fiksar hættir, so tað skal síggja øgiligt út.

Men hetta hjálpir lítið, tí tær ætlanir, sum vit hava sett upp, eru so eyðsýniliga neyðugar, og eru júst tað, sum tørvur nú er á. Nú fólksins lívskor í 4 ár hava verið løgd á hyllina til frama fyri forfongiligheitina hjá loysingarsamgonguni.

**Polariseringstátan**
Tað er skilligt, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru firtnir um, at Javnaðarflokkurin gjørdi eina so ítøkiliga og greiða valskrá. Hesir flokkar liva jú av hvørjum øðrum. Teir hava ikki fólksins lívskor sum høvuðsmál. Teir vilja helst, at føroyingar klandrast um samband ella loysing.

So longi tað eydnast teimum at brúka hesa polariseringstátu, er teirra politiska framtíð viss.

**Kontraktin**
Uppímóti hesum mjørkatosi hevur Javnaðarflokkurin eina ítøkiliga valskrá, eina valskrá, sum vit eisini hava sett tøl á.

Hesa skrá bjóða vit okkum at gera ein sáttmála við veljaran um at fremja, eydnast tað okkum at leiða komandi samgongu.

Eftir 4 árum er tað einfalt hjá fólki aftur at taka fram skránna og kanna, um vit rukku málunum.

Tí er valið 30 apríl einfalt. Ein atkvøða fyri Javnaðarflokkinum er ein atkvøða fyri aftur at seta fólksins kor á skránna.

# Hvat nú

**Jákup á F. Jacobsen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum*



Ikki er gjørligt at greiða stutt frá øllum sjónarmiðum Javnaðarfloksins. Sigast kann tó, at Javnaðarflokkurin stuðlar øllum, ið er samfelagnum at gagni.

Valevnini fara tí við skynsemi og eftir bestu sannføring at fremja javnaðarhugsjónina í verki, til frama fyri føroya fólk.

Sjálvandi eiga vinna, útbúgvingar, heilsuverk, ríkisrættarliga støðan og mong mong onnur mál at verað nevnd. - Men uttan iva er ikki nakað valevni hjá nøkrum flokki, íð ikki hevur stóran áhuga fyri øllum tílíkum. Alt annað vildi verið óhugsandi.

Men verri er ofta statt tá hugsað verður um t.d. landbúnaðin, samferðslu uttan fyri meginøkið, útoyggjar og tílíkt, sum mangan ikki er so sjónligt í samfelagnum til dagligt.

Støðan er tann, at ein meiriluti velur ein ógvuliga lítlan minniluta at stýra einum so stórum meiriluta, sum øllum Føroya fólki, og soleiðis kemur at avgera umstøðurnar, sum allir Føroyingar koma at liva undir í frammtíðini.

Tí er sera umráðandi at umhugsa støðuna gjølla. - Avgerðin er bindandi og kann ikki broytast . – avgerðin um, hvussu eg og tú og øll onnur her á landi skulu húsast í framtíðini.

Tað er tí neyðugt at velja hóvlig, siðilig og skilagóð umboð at stýra landi okkara.

Tann, ið ynskir tað besta fyri framtíðina í Føroyum, fer á val valdagin og setur ein trivaligan kross við Javnaðarflokkin ella eitt av valevnum teirra.

Við javnaðarheilsu.

# Miðloysnin er gongda leiðin

**William Max Hansen**
*valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Vit hoyra javnan, at hugsjónin Javnaðarfloksins í ríkisrættarlig málinum ikki er løtt at fremja í verki. Men hon letur seg fremja, verður kortini dentur lagdur á. Sjálvandi er lættari at samráða seg til fulla loysing ella til bara lata standa til, sum er framhaldandi óbroytt samband.

Tað var tað eisini í 1946, tá Fólkaflokkurin og føroyingarfelagsfólk tvíhildu um loysing, samstundis sum sambandsfólk annaðhvørt vildu hava amt ella vildu hava eina skipan, sum minti mest um amtsstøðuna.

Tá helt Javnaðarflokkurin eisini, at vit skuldu víðari. Men hann helt ikki, at vit áttu at loysa frá Danmark. Hesa hugsjón hevði hann fest á blað í 1943 sum uppskot til arvaskifti um ein politikk framá. Og tað skerst ikki burtur, at hugsjónin sigraði.

Støðan í dag kann samanberast við støðuna eftir annan heimsbardaga. Fyri fleiri árum síðani ásannaði Javnaðarflokkurin á landsfundi, at Heimastýrislógin var um at vera tømd, hevði veikleikar og at neyðugt var við greiðari linjum. Flokkurin kom tí til ta niðurstøðu, at virkast skuldi fyri eini nýggjari lóg. Einum sáttmála, sum greiðari heimilaði yvirtøkur, og sum gjørdi føroyska samfelagið búskaparliga meiri sjálvberandi.

Sambandsflokkurin helt fast um, at einki bilti Heimastýrislóguni líka til á vári 1999. Harafturímóti helt Tjóðveldisflokkurin, at einasta leiðin var loysing. Hevði Sambandsflokkurin beinanveg í 1997 vilja gingið við til at seta eina stjórnmálanevnd, vóru vit ongantíð komin í ta politisku hurlivasastøðu, sum forholdið Føroyar Danmark er nú.

Nýggja Tjóðveldi vann við hugsjónini um "skipaða loysing" og "fullveldi". Men tað er ein óreingandi verunleiki, at tað er ikki meirluti fyri fullveldi. Og tað verður tað neyvan, og enn minni er undirtøkan fyri frammhaldandi óbroyttum sambandi.

Harafturímóti fær hóvliga miðleiðin stórstu undirtøkuna. Hettar er júst Javnaðarfloksins uppskot til framhaldandi felagsskap við Danmark. Sjálvstýrislógin hevur higartil verið tað mest kostruktiva uppskotið í verið hevur - og tað man eisini vera gongda leiðin, tá avtornar.

Ver tí erlig/ur við sjálvan. Set kross tín á lista C.